# Carnival
## fyri fimtu ferð

**Fríggjadagin 28. mars fekk Poul Jensen, hýruvognsførari á bilstøðini Auto í Havn, sín fimta Kia Carnival hýruvogn.**

Poul keypti sín fyrsta Kia Carnival 23. januar 2001, tann næsta 22. mars 2002, tann triðja 14. mai 2004, tann fjórða 10. apríl 2006 og tann fimta seinasta fríggjadag.

Felags fyri allar bilarnar er, at teir hava havt 2,9 litra turbodiesel motor, og allir hava havt nummarplátur við PJ framman fyru tølini.

Í hesi sjey árini, frá tí at hann keypti sín fyrsta bil til í dag, hevur Poul koyrt tilsamans 603.493 kilometrar. Hann hevur verið væl nøgdur við sínar Kia Carnival, sum hann heldur eru væl egnaðir til hýruvognskoyring í høvuðsstaðnum.

Danska KIA magasinet hevur eisini fleiri ferðir nevnt Kia bilarnar hjá Poul Jensen.




*Jákup Jacobsen, sølumaður hjá Berg Motors (h.m.), handar Poul Jensen tann fimta Kia Carnival, sum sjálvandi eisini hevur PJ framman fyri tølini á nummarplátuni*

RÁS 2 ...títt radio

## Bilradio

Hósdagin 3. apríl millum kl. 16 og 17 verður sendingin »Bilradio« á Rás2.

Talan er um eina sending við tilfari um motorakfør og ferðslu, sum verður send hvønn hósdag og endursend fríggjamorgun millum kl. 8 og 9 og leygardag millum kl. 13 og 14.



*XC60 er ein sonevndur crossover í eyðkendum Volvo-stíli*

# XC60 – nýggjur crossover frá Volvo



*Aftan er heldur eingin ivi um, at talan er um ein Volvo*



*Innan líkist XC60 hinum bilunum í Volvo familjuni. Einfalt og smart design*

**Volvo XC60, sum fyrstu ferð var at síggja sum konseptbilur á bilaframsýningini í Frankfurt í september 2007, hevði heimspremieru á bilaframsýningini í Genéve fyrst í mars. Bilurin kemur á evropeiska marknaðin í heyst**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Volvo XC90 fær seinni í ár ein lítlabeiggja, XC60, sum kemur á evropeiska marknaðin í heyst. XC60 er ein sonevndur crossover í eyðkendum Volvo-stíli.

XC60 líkist nógv XC90, sum er sera væl umtóktur um allan heim.

Volvo eru kendir fyri sínar framkomnu trygdarskipanir, og XC60 verður ein av tryggastu bilum yvirhøvur. Hann hevur t.d. framkomnu og intelligentu trygdarskipanina City Safety sum standard. Skipanin hjálpir bilførararanum við at umgangast álvarsligu avleiðingarnar av samanstoytum við lægri ferð, sum ofta kemur fyri í ferðsluni í býunum.

Í fyrstu atløgu verður XC60 at fáa við trimum ymiskum motorum: T6 bensinmotori við 285 hk, og tveimum D5 turbodiesel við ávikavist 163 og 185 hk. Næsta ár kemur eisini ein sera umhvørvisvinarlig 2,4 litra útgáva við 163 hk. Allar tær fyrstu útgávurnar verða 4-hjólsdrivnar, tó kemur onkur útgáva seinni, sum bert verður drivin av forhjólunum.

Volvo XC60 verður bygdur á verksmiðjuni hjá Volvo Cars í Gent í Belgia, og bilurin kemur á evropeiska marknaðin seinni í ár.